# NØVN

SAMBAND
MAGNUS GUNNARSSON
MAGGI@SOSIALURIN.FO
TLF 341800 FAX 341801

*Á hesum síðum bera vit tíðindi um merkisdagar, so sum rundar føðingardagar, brúdleypsdagar, starvssetanir o.t.*

## Ein heilsa til pápa mín

**Ein heilsa til pápa mín Niels Juul Haraldsen, Miðvág, ið fórst við »Sjóstjørnini« februar 1973**

Setti meg niður eina løtu, eg føldi á mær, at eg hevði ein serligan tørv at gera tað júst nú. Eg vildi hava teg fyri meg sjálvan – bert eina lítla løtu. Kanska var tað tí, at dagurin í dag er tín pápi – hesin dagurin av øllum og álíkavæl ert tú ikki her. Kenslur mínar og longsulin eftir tí, sum eg ikki kann fáa, tí tú ert ikki her. Men eitt eigi eg – minnini um teg pápi. Minnini gera, at tú ert livandi fyri mær, har tú stendur og brosar móti mær og varrar tínar teska so eymliga, kom her í mín favn, mítt elskaða barn og fortel, hvat tú hevur spælt við í dag. Tú streyk mær eftir hárinum, kysti meg á kjálkan og hugdi uppá meg – hugdi uppá meg við teim eygum, sum søgdu mær so nógv. Eyguni gjørdi, at eg kendi hitan og kærleikan frá tær, langt áðrenn tú tók meg í tín favn.

Her var eg trygg – her kundi eingin gera mær nakað – einki ilt kundi henda mær – tín nærvera fyri okkum øllum var so ómetaliga stór. Eg boraði meg longur inn í tín trygga favn, meðan eg kroysti dukkuna hjá mær inn at mær – dukkuna, sum eg fekk frá tær pápi – dukkan sum fekk ein serligan týdning, tá tú ikki vart meir.

Í dag – 25. februar tendraði mamma 3 ljós – eitt til hvønn okkara – pápa, beiggja og mær. Ljósini skuldu vísa okkum leiðina til tað staðið, sum vit, hvør á sín hátt vóru farin frá. Fyri børnunum, sum fara frá heiminum at byggja sítt egna reiður og fyri pápa, sum tað máttmikla havið ikki vildi sleppa, men hevur goymt har – eg vildi so ynskt, at tú á tínum 80 ára føðingardegi var her hjá okkum – bert eina lítla løtu.

Eitt eri eg glað fyri pápi – sjálvt um havið tók nakað so dýrabart frá mær, beiggja og mammu, so kann eingin taka tey dýrabaru minni frá mær – ja, glað og takksom.

Sjálvt um eg ikki kann taka teg í mín favn, so kann eg altíð siga at eg elski teg.

**Dóttir tín**

**Dagurin**

**5. mars. Teophilus**, deyður umleið ár 200. Embætismaður í Kesarea. Navnið merkir hin guðelskandi.




# Gunnvør Justinussen 60 ár

**Tann 1. mars varð Gunnvør Justinussen, f. Mikkelsen, 60 ár.**



Hvør skuldi trú tí.........Tann 1. mars 1948 í Lopra, var kona mín og mamma okkara borin í heim. Elst av 10 systkjum. Gunnvør var bert 1 ára gomul tá hon missir pápa sín. Hon kom bert einaferð í samband við pápa sín Gunnar, av tí at han var so sjúkur av tuberklum. Gunnvør vaks upp í Lopra hjá ommuni Augustu, omman sjálv átti 10 børn. Gubbi Gunnvør, Hans Olaf Andersen mammubeiggi, hevur staðið Gunnvør fantastiska nær „sum ein pápi“. Tá hini børnini, sum Gunnvør spældi við sum heilt lítil genta, fortaldu, at pápi teirra kemur heim, segði Gunnvør, at gubbi mín kemur heim tá og tá.

Omma Gunnvør lærdi hana alt møguligt, m.a. at binda húkar, fyri at tjena sær nøkur oyru. Gunnvør gekk í skúla úti á Leiti. Sum 16 ára gomul og ein sera vøkur genta (papi fortelur frá), fór hon til Havnar at ganga á Háskúla.

Tað var tá, at hon møtir manni sínum Olaf Justinussen málara, “eg fall pladask fyri hesi vøkru gentu” eftir bert einum hálvum ári eftir at hon er komin til Havnar. Tey giftast í 1966 í Lopra. Saman fáa tey fýra børn, tann fyrsta sonin Gunnar í 1965, síðan dóttrina Ann í 1967, síðan sonin Aron í 1969, og so sonin Garðar í 1974. Tá Mamma okkara bert var 27 ára gomul, áttu tey fýra rollungar.

Kona og Mamma okkara hevur alla okkara tíð verið heimaarbeiðandi, og tað var sera trygt at vita sær, at mamma altíð var heima, tá man kom úr skúla. Hon hevur gjørt eitt fantastiskt arbeiði í heiminum hjá okkum. Tað er beinanvegin, tá man kemur inn um dyrnar, at tað verður serverað fyri okkum.

Gunnvør eigur eisini 9 ommubørn (Gunnar giftur við Margit) Eva, David og (Ann gift við Hans Jacob) Filip, Levi, Jóhannes og (Aron giftur við Vanju) Teitur, Mirjam og (Garðar livur saman við Idu) Ronja, Hanna.

Foreldrini hjá Gunnvør vóru Mary Skaalum (fødd Andersen í Lopra) og pápin, Gunnar Mikkelsen (føddur í Vági), dámdi væl at spæla Harmoniku, sum doyði av tuberkulosu á Sanatoriu í Hoyvík, bert 23 ára gamal.

Foreldrini hjá Mary vóru: Augusta og Anders Andersen Lopra, og foreldrini hjá Gunnar vóru Kristina og Gudmund Mikkelsen í Oyruni.

Pápi okkara og vit systkini við maka og ommubørn, ynskja hervið at gratulera Gunnvør – mammu, konu, sviermor og ommu á hennara 60 ára degi og Harrans signing framyvir. Vit takka fyri alt tað, tú hevur verið og er fyri okkum. Alt tað besta ynskist tær.

**Ynskja Olaf, Gunnar, Ann, Aron og Garðar**

Vit ynskja at senda tær hendan vakra sangin:

### Mamma mín

*Orð: Harry Birtilið Lag: Águst Pétursson*

*Góða mamma, tú ið lívið gav mær,*
*aftur koma barndómsdagar ei,*
*men tey ljósu minni, eg fekk frá tær*
*vilja lýsa mær á lívsins leið.*

*Mangar mammur syrgnar heima sita*
*tí ein sonur gloymdi burtur tær.*
*Men mín góða mamma tú skalt vita,*
*at tú stendur hjarta mínum nær.*

*Meðan tú enn livir, vil eg veita*
*hesa hjartans tøkk til tín,*
*og av sonnum skal tú altíð eita:*
*Heimsins besta mamma, mamma mín.*

*Og tá lívsins stormar á meg herja*
*og eg óttafullur standi har*
*veit eg, tú við bønum meg vilt verja*
*- móðireygað vekjur yvir mær.*